**Røða hjá Dennis Holm, landsstýrismanni, í sambandi við, at Dalstunnilin varð skotin ígjøgnum 9. nov. 2023**

Góðu áhoyrarar – góðu dalbingar og øll tykur, sum hava tilknýti og alsk til hesa vøkru bygd.

"So close, yet so far from Paradise" sang Elvis Presley í 1965 – og tað er ikki heilt frítt, at eg hugsi tað, tá eg av Smyrli síggi inn á hesa vøkru bygd á leiðini millum Suðuroynna og Havnina.

Tað er ein løgin kensla at síggja eina bygd fleiri ferðir um vikuna, uttan at vitja hana – leiðin gongur altíð framvið – og eg havi í veruleikanum bara verið her nakrar fáar ferðir í lívinum.

Orsøkin er einføld, gott samband við umheimin er í dag lívæðrin – ikki bara hjá útoyggjum við siglandi farleiðum – men eisini hjá smærri bygdum, sum, hóast tær eru tætt við meginøkið, kunnu vera avskornar.

Í modernaða samfelagnum er gott samband – vegir, tunlar, undirsjóvartunlar, brýr og gott ferjusamband – ein so heilt avgerandi partur av trivnaðinum í gerandisdegnum. Gerandisdagurin er hjá teimum flestu skipaður í mun til, at tað er lætt og skjótt at fara – og tá okur velja at seta búgv, so hevur tað stóran týdning, at okur lætt, skjótt og trygt kunnu ferðast til arbeiðis, í skúla, til ítróttar- og mentanartilboð, til almennar tænastur og ikki minst at vitja okkara nærmastu.

Dalur er ein av smáu bygdunum í landinum, har vegasambandið ikki er á sama støði, sum tað í dag er í flestu pørtum av landinum. Okur, sum fyrr koyrdu dagliga um Hovsegg, minnast aftur á tíðina, tá man noyddist um Hovsegg í stormi ella kava á vetrardegi – og tað er ikki heilt frítt, at man bleiv mintur á ta kensluna, tá okur fyri løtu síðani komu eftir vegnum í Dalsbergi.

Í Dali hevur tað í áratíggju verið eitt ynski um at fáa ein tunnil til bygdina. Aðrar smáar bygdir – millum annað Fámjin, Tjørnuvík og Gjógv – hava eisini seinastu nógvu árini verið á breddanum, tá skiftandi løgting og landsstýri hava umrøtt tunlar til smáu avskornu plássini kring landið.

Nú fáa tvær av bygdunum so tunnil, og farið er undir at fyrireika tunnil til Tjørnuvíkar – og eftir tað er tunnil til Gjáar næstur í røðini.

Tað var í mars í 2018, at farið varð undir at fyrireika nýggja farleið við tunli millum Húsavík og Dal. Í mai 2019 varð hakin settur í fyri nýggja vegin til tunnilsmunnan Húsavíkarmegin. Men verulig gongd kom ikki á fyrr enn í november í 2020, tá fyrsta skotið varð latið av til Dalstunnilin.

Og nú 3 ár seinni – næstan upp á dagin – verður so seinasta skotið latið av í Dalstunlinum.

Talan er um ein 2.200 metrar langan og 8 metrar breiðan tunnil. Umframt hetta skulu eisini gerast 150 metrar av vegi Húsavíkarmegin og 100 metrar av vegi Dalsmegin. Síðan skulu umleið 2.500 metrar av vegi afturat breiðkast.

Í mun til teir flestu nýggjaru tunlarnar í landinum, so hava Landsverk og tunnilstoymið hjá Landsverki staðið fyri arbeiðinum í Dalstunlinum. Og nøkur okkara, sum minnast aftur á orðaskiftið um at skipa tunnilstoymið, kunnu bara staðfesta, at tunnilstoymið hevur gjørt øllum kritikkarum til skammar og hevur framt eitt framúr gott arbeiði.

Um 1½ mánað letur Sandoyartunnilin upp fyri ferðslu, og veruleikin hjá flestu sandoyingum broytist tá, frá at vera í einari støðu, har man er avskorin frá meginøkinum við siglandi farleið um Skopunarfjørð, til at kunna koyra til meginpartin av landinum.

Eg ivist ikki í, at hetta fer at merkja gerandisdagin í Sandoynni komandi árini – og at fleiri fólk fara at seta búgv í hesari vøkru oyggj.

Um tvey ár ella so verður Dalstunnilin liðugur, og verður tá partur av vegakervinum í Føroyum. Farið verður tá frá farleiðini eftir vegnum í Dalsbergi til ein breiðan, høgan og ljósan tunnil. Gerandisdagurin hjá dalbingum fer tá eisini at broytast munandi – og fer hendan perlan í Sandoynni uttan iva eisini at merkja ágóðan av tí komandi árini.

Dagurin í dag er ein stórur dagur fyri dalbingar, ein stórur dagur fyri Sandoynna og fyri allar Føroyar – og hóast tunnilin ikki letur upp fyri ferðslu, so fari eg at ynskja øllum hjartaliga tillukku við hesum fyrsta týðandi stignum til eina dagførda farleið til Dals.

Takk til tykkum øll, sum hava skipað verkætlanina og staðið fyri arbeiðinum – og bestu eydnu í framhaldinum, nú Dalstunnilin skal gerast heilt liðugur.

Takk fyri.